# Skifta køkar í summar



Á Eikini tosa tey ikki um háárstíðir í mun til fleiri aðrar handlar. Summarið skilir seg ikki frá hinum árstíðunum og selja tey javnt nógv árið runt. Har verður ikki tosað sesongvørur sum so. Tó so, hevur tað víst seg, at í summar hava tey selt rættiliga fitt av skápum við dragihurðum. – Tað vísir seg, at tað er tað sum fólkið vil hava fyri tíðina, verður sagt av Eikini.

Eisini hava tey selt rættiliga fitt av køkum í summar. Hetta er árstíðin, har fólkini velja at umvæla og skifta køkar út, so tað hava vit eisini selt væl av nú, siga tey av Eikini, og kunnu fortelja, at tey júst hava fingið eitt stórt úrval av sofum sendandi. Sofurnar eru úr italskum sniði, og eru bæði klassisk og modernaði snið og litir.




















